GJALDSTOVAN

# Útbjóðingarskriv

## Leitað verður eftir einum veitara at hjálpa Gjaldstovuni at skifta/dagføra lásaskipan á skrivstovum okkara

## Um Gjaldstovuna

Á Gjaldstovuni slóða vit fyri, at almennu Føroyar eru millum mest effektivu og dugnaligu fyrisitingarnar. Vit menna loysnir innan KT, roknskap, lønir og talgilding.

Vit eru stovnur undir Fíggjarmálaráðnum. Vit arbeiða miðvíst við at skapa tryggar, gjøgnumskygdar og nýmótans skipanir, og vit leggja stóran dent á standardisering og miðsavning av tænastum og mannagongdum.

Okkara virksemi fevnir um sjey høvuðsøki:

- **KT Landsins** - Mennir og rekur kt-kervi og tænastur til almennar stovnar og skúlar.
- **Løn & Bókhald Landsins** - Umsitur lønir og útgjøld við nærlagni og ábyrgd.
- **Búskaparskipan Landsins** - Veitir amboð til skynsama fíggjarstýring.
- **Landsroknskapurin** - Hevur yvirskipaðu ábyrgdina av landsroknskapinum og tryggjar eina effektiva umsiting.
- **Keyp Landsins** - Fremur kappingarført innkeyp umvegis Keypsportalin.
- **KT Trygd** - Tryggjar at kt-kervini lúka lóggávu og góðar siðir.
- **Talgildu Føroyar** - Mennir talgildar tænastur til borgarar, vinnu og landið.

Vit eru umleið 70 starvsfólk við høvuðssæti í Albert Hall á Argjum og skrivstovu í Klaksvík. Á skrivstovuni á Argjum húsast eisini Hagstovan og Landsbankin. Vit leggja dent á fakliga menning, góðar arbeiðsumstøður og trivnað.

## Okkum tørvar

Fyri Gjaldstovuna hevur tað týdning, at okkara vitan, dátur og ognir, eru tryggar. Tí tørvar okkum at dagføra okkara gomlu lásaskipan.

Vit hava tveir bygningar – Albert Hall, Argir og BASK, Klaksvík.

- Vit hava fylgjandi hurðar á Albert Hall.
    - Úthurðar – 3 hava kaðal/online samband og 1 hevur offline samband
    - Innhurðar – allar hava offline samband
        - 3 hædd – 6 hurðar
        - 2 hædd – 7 hurðar

    - 1 hædd – 10 hurðar
    - Kjallari – 3 hurðar
- BASK í Klaksvík, har hava vit 2 hurðar við kaðal og 2 sum eru offline.

Tað er eitt krav, at veitarin bjóðar eina loysn, sum hevur ein platform, ið er lættur hjá okkara kt-fólkum at umsita. Bæði við at stovna lyklar og geva ymiska brúkara atgongd. Umsiting av platforminum skal verða í eini cloud skipan. Rakstur og dagføring av skipanini skal verða partur av veitingini.

Tað er eitt krav, at skipanin loyvir at man kann lata hurðar upp við telefon (t.d. bluetooth, NFC). Hetta skal verða líka einfalt, ella nærum líka lætt, sum at brúka chip lykil. Bæði Android og iPhones verða brúktar.

Vit síggja fyri okkum, at øll lás eru online, tvs at man fær live samband við lásini um neyðugt og lyklarnir verða dagførdir av øllum lásunum.

Allar úthurðar skulu hava lesarar við numeriskum tastatur til PIN kotur. Tað skal bera til at krevja PIN kotu eftir arbeiðstíð.

Tað skal vera einfalt at geva tíðaravmarkaða atgongd til eitt nú gestir og handverkarar.

Vit vilja helst ikki hava lás við mánaðarligum gjøldum. Um veitari bjóðar skipan við mánaðarligum ella árligum gjøldum, so verða hesi gjøld umroknaða til ein 10 ár kostnað, og tikið við í samlaðu metingina fyri kostnaðin frá veitaranum.

Teir chip lyklar sum lás nýta, skulu kunna nýta Mifare tøkni sum minimum. Hetta tí at vit hava aðrar skipanir har okkara lyklar geva atgongd, eitt nú kantinuskipan, prentarar og klokkuskipan.

Ynski er at platformurin hevur lás til rackskáp og onnur skáp. Upplýs prís í tilboð.

Lásini skulu rigga tá tað er streymslit ella netsambandið er burtur

Skipanin skal eisini loggað atgongdir og admin gerðir í umleið 1 ár.

Møguleiki er eisini at fleiri av landsins stovnum velja at gerast partur av tilboðnum.

## Uppgávurnar

Vit hugsa okkum, at talan verður um heildararbeiðið. Tað vil siga, at veitarin setur alt upp og stendur fyri øllum, eisini um hetta inniber at fáa aðrar veitarar/handverkarar inn.

Vit hugsað, at tann veitari sum fær uppgávuna, verður eisini okkara lásaveitari eftirfylgjandi.

Minst tvey starvsfólk hjá okkum skulu upplærast í umsiting av skipanini.

Vit eru opin fyri ymiskum tekniskum loysnum, bara okkara tørvur verður nøktaður.

Tað verður upp til veitaran sjálvan at meta um hvussu neti við access points verður uppbygt, treytin er tó at øll skipanin riggar á full góðan hátt.

Vit bjóða veitarum atgongd til at síggja okkara skrivstovur og til at samskifta við okkara lykla ábyrgdara – Hilmar Augustinussen. Hilmar hevur telefon nr 352477.

## Tilboð

Veitarin letur tilboð á eina skipan, sum kann tað vit ynskja. Veitarin skal verða vælkomin at bjóða fleiri/eyka loysnir, móti meir kostnaði.

## Krøv til tilboðið

Tilboðið frá veitara skal fevna um:

- Samlaðan kostnað
- Upplýs prís av møguligum eyka útgerð, so sum lás til rackskáp ella annað, sum veitarin heldur at Gjaldstovan skal umhugsað. Telur ikki við í dómsmeting.
- Upplýsingar um møguligar eftirfylgjandi gjøld fyri lásaskipanina.
- Lýsing av loysn, sum veitarin bjóðar.
- Databløð av loysn, sum veitarin bjóðar.
- Myndir av tí útgerð, sum skal verða sjónlig, í fall myndir ikki eru í databløðum.
- Upplýsingar um umsitingarskipanina veitarin bjóðar.
- Um skipan verður hýst uttan fyri húsið, so skal hetta verða neyvt upplýst.

Tilboð sum ikki lúka minsta krøv verða ikki tikin við.

## Hvussu verður vektað

Innkomnu tilboðini verða vektað soleiðis:

- Góðska 50%
- Prísur 50%

Útrokningin fer fram á henda hátt:

**Góðska**
Hugt verður eftir góðskuni, sum skipanin hevur. Tað er ein meting av góðskuni av hardware, tað er ein meting av góðskuni av software, tað ein meting av umsitingarpallinum og av hvussu brúkaraupplivingin er.

Um veitarin kann vísa á stovnar ella virkir, sum brúka loysnina hjá veitaranum, so er tað ein góður háttur at staðfesta góðsku. (referansa)

Vit gera vart við, at hetta er okkara kvalitativa meting av góðsku, t.e. hvørja meting Gjaldstovan hevur av innkomna tilfarinum.

Út frá eini samlaðari meting av góðsku verður eitt stigatal á einum skala frá 1-50 givið, har 50 er hægsta stigatal

**Prísur**
Tilboðið við lægsta samlaða prísi fær 50 stig. Hini tilboðini fáa ásett eitt stigatal eftir hesum frymli: Tilboð við lægsta prísi/prísur í tilboði, ið skal metast x 50

GJALDSTOVAN

# Dómsnevndin

Gjaldstovan setur eina dómsnevnd at meta um innkomnu tilboðini. Í henni sita umboð fyri leiðsluna, starvsfólk sum arbeiða innan øki og Keyp Landsins.

Sáttmálin verður tillutaður sambært ásettu tillutanartreyt, sum er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og góðsku/førleikar.

## Viðgerð av innkomnum tilboðum

Útbjóðari letur upp innkomin tilboð aftaná ásettu tilboðsfreist. Útbjóðari kannar eftir, um innkomnu tilboðini lúka form- og minstukrøv. Útbjóðari kann, aftaná tilboðsfreistina, venda sær til tilboðsgevarar fyri at neyvlýsa innihaldið í tilboðunum. At enda verða innkomin tilboð mett í tráð við ásettu tillutanartreytirnar.

Tá ið útbjóðari hevur tikið avgerð um tillutan av sáttmálanum, verða allir tilboðsgevarar kunnaðir samstundis. Kunningin inniheldur eina frágreiðing um avgerðina, harundir fyrimunir og vansar við vinnandi tilboðnum.

# Hentar upplýsingar

Tilboðsgevari hevur møguleikan at fáa fleiri upplýsingar við at seta skriftligar spurningar. Spurningar skulu sendast til **keypsportal@gjaldstovan.fo**

Spurningar, ið eru settir fyri týsdagin 23. september kl. 13.00, verða svaraðir í seinasta lagi mikudagin 24. september kl. 16.00.

Spurningar verða svaraðir skrivliga. Allir spurningar og svar verða sendir dulnevnd til tey, sum geva tilboð.

Tilboðsfreist og teldupostadressa til avhendan av tilboði

Freist **mánamorgunin 29. september 2025 kl. 12.00**

Tilboð skulu sendast til **keypsportal@gjaldstovan.fo**